

# Býlingsstjóri til SMS

## Tú ert ein kreativur leiðari, sum dámar at skapa, seta saman og samskipa, og tú hevur tev fyri tølandi marknaðarføring

Dámar tær lýsingina, so átti tú at søkt sera spennandi starvið sum býlingsstjóri í nýggja SMS, ið verður liðugt út- og umbygt í oktober í ár.

Vit nevna tað býlingsstjóri, tí SMS er vorðin ein livandi býlingur við fjølbroyttum virksemi. SMS er staðið, har alskyns vørur fáast í hugnaligum handlum, leikur gongur lívliga á torgum, og kenningar hittast í túnum.

**Starvið**
Býlingsstjórin er dirigenturin, sum stjórnar, so alt orkestrið spælir væl og svingar saman. Hann hevur ábyrgdina av, at umstøðurnar hjá teimum 32 handlunum at virka eru tær allar bestu, og at tey um 70.000 fólkini, sum vit vænta hvørja viku, halda tað vera spennandi, hugnaligt og trygt at fara til handils.

Býlingsstjórin fær sostatt ábyrgdina av, at allar fortreytir í gerandisdegnum eru í lagi hjá handlum og vitjandi. Hann skal tryggja, at uppbyggjandi samskifti er við leigararnar, samstundis sum útbúgving og persónlig menning gerast ein rótgrógvin partur av SMS.

Býlingsstjórin skipar fyri kreativari, viðkomandi og gjarna øðrvísi marknaðarføring, og hann stendur fyri spennandi torg-tiltøkum í samstarvi við mentanarheimin og onnur. Harafturat skal býlingsstjórin syrgja fyri, at neyv fíggjarstýring verður framd í samstarvi við fíggjarstjóran hjá felagnum.

**Førleikar**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur hóskandi útbúgving og hevur loyst líknandi uppgávur í verki; men tað er eingin treyt.

Vit vænta, at tú hevur sterkar persónligar eginleikar, so sum arbeiðssemi, dynamikk og skapanarlyndi. Tú dugir væl við fólki, samskiftir skilliga og skynsamt og skapar ein stimbrandi liðanda.

Tað er umráðandi, at tú hevur sans fyri eini marknaðarføring, sum sæst aftur í meldrinum. Vit leggja dent á at skapa okkara egna tilfar, sum bæði fylgir altjóða rákum og tekur støði í tí heimliga.

**Vit bjóða**
Starvið sum býlingsstjóri í SMS er eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við stórum møguleikum. Tú byrjar sum óskrásettur stjóri, men prógvar tú tínar dygdir, kanst tú gerast skrásettur stjóri í Pf. SMS.

Starvið er krevjandi, og tí er lønin góð við møguleika fyri einari bonusskipan.

Eitt mát fyri, um býlingsstjórin megnar sína uppgávu, er talið av vitjandi, og hvussu væl handlarnir í SMS klára seg fíggjarliga.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 1. juli. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknir skulu sendast til:

Pf. SMS
att.: Hans Mortensen
á Trapputrøðni
Postboks
110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Hans Mortensen, stjóra á telefon 212366.

SMS
Ein býlingur í Havn

SMS - á Trapputrøðni - 100 Tórshavn - Tel 31 30 41 - Fax 31 74 34 - sms@sms.fo - www.sms.fo



# Almannastovan søkir løgfrøðing

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

**Á skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini er ein sosialráðgevi í fulltíðarstarvi, sum hevur ábyrgd av tí rakstrarliga og at leggja arbeiðið á skrivstovuni tilrættis. Skrivstovan hevur til uppgávu at fyrireika mál, sum verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, sum tekur avgerðir sambært barnaverndarlógini m.a um umsorganaryvirtøku og skipan av hesi, samverurætt í sambandi við umsorganaryvirtøku, rætt til ókeypis umboðan, vm.**

**Á Stjórnardeildini eru 3 starvsfólk í fulltíðarstarvi og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, gerð av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.a..**

Starvið sum løgfrøðingur er eitt fulltíðarstarv, býtt í helvt ímillum skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini og stjórnardeildina á Almannastovuni. Tær báðar eindirnar halda til í somu hølum og hava eitt tætt samstarv.

Løgfrøðingurin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at løgfrøðingurin er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan almenna fyrisiting.

Arbeiðsuppgávurnar hjá løgfrøðinginum fevna á barnaverndarøkinum um at ráðgeva í løgfrøðiligum spurningum, at fyrireika mál og tryggja, at tey eru væl lýst, áðrenn tey verða løgd fyri høvuðsbarnaverndarnevndina. Uppgávurnar á stjórnardeildini fevna um løgfrøðiliga ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk, ummælan av uppskotum til lógir og kunngerðir á almannaøkinum, málsviðgerð í ávísum málum, tilevnan av leiðbeiningum og kunningartilfari, luttøku í tvørfakligum samstarvi og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Fleiri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 14. juni 2006, kl. 12.00.

Send umsóknina til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo